Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Mikudagur

Nr. 209 • 121. árgangur

5. november 1997

Tlf. 11212 • Fax 10941

kr. 7,00

Kirkjuráðsvalið – hitt spaka valið

Til kirkjuráðsval eru sjáldan nógv fólk og velja. Men í ár hava summi valevni verið úti og dyrgt – hava sent brøv út og biðið fólk um at valt seg. Men fyri summi kann hetta geva baksláttur – dyrgingin ger, at fólk heldur velja onkran annan.

Baksíðan

Orðið í norði

Stjórin í Norðurlandahúsinum, Peter Turtschaninoff, handaði í gjár Martini Næs, landsbókavørði og leiðara á Landsbókasavninum, eina stórfingna bókagávu, millum 700 og 800 bøkur, til eitt samlað virði uppá fleiri hundrað túsund krónur.

Heimatíðindi 5

Føroyskt ov torført fyri børnini

– Næmingar í barnaskulanum eru ikki búnir at læra nakað av tydningi í føroyskari mállæru, heldur Jeffrei Henriksen, ein av okkara fróðarmonnum í føroyskum. At byrja ov tíðliga ger, at fólk seinni halda mállæru vera torførari enn henni nýtist at vera, sigur hann.

Heimatíðindi 3

Landnyrðingurnorðan, 3-5 m/s. Skýggjað og regn viðhvørt. Hitin: 4-8°.

Fiskavirking og Fiskasølan fáa ikki meir úr Framtaksgrunninum

Fiskavirking og Fiskasølan skulu ikki hava meir pening úr Framtaksgrunninum, og nevndarlimirnir í grunninum mugu ikki verða partar av nevndunum, sum grunnurin veitir stuðul. Hetta er millum treytirnar, sum fíggjarnevndin leggur við, skal Framtaksgrunnurin fáa neyðuga eginpeningin.

INGI RASMUSSEN

Ein samd fíggjarnevnd mælir løgtinginum til at geva løgmanni heimild til at leggja 12,5 milliónir krónur av lánsupphæddini um til stovnsfæ.

Men treytir fylgja við.

Framyvir kann grunnurin ikki veita tilsagnir um eginpening ella ábyrgdarpening til feløg, sum grunnurin longu hevur fingið avgerandi avvirkan á, stendur í alitinum.

Hetta merkir, at skuldu Fiskasølan og Fiskavirking aftur fingið trupulleikar, so kann Framtaksgrunnurin ikki taka um endan einaferð enn.

Samstundis halda fíggjarnevndarlimirnir tað verða óheppið, at nevndarlimir í Framtaksgrunninum eisini eru nevndarlimir í feløgum, sum grunnurin veitir ella hevur veitt stuðul.

Sagt verður, at nevndarlimirnir lættliga kunnu koma í tvistøðu, har trupult verður at skilja millum uppgávurnar sum nevdarlimir í ávikavist grunninum og felagnum.

Tí mælir nevndin til, at landsstýrið í tilsøgn sini til Framtaksgrunnin at umleggja lánspening til eginpening, skal skipa soleiðis fyri, at Framtaksgrunnurin velur sini umboð í nevndir uttanfyri grunnin.

Fíggjarnevndin krevur ikki nevndina frá fyri at veita grunninum neyðuga eginpeningin, men mælir hinvegin til, at nevndin í grunninum bara skal sita fyri tvey ár í senn og ikki sum nú í tryð. Kortini er einki til hindurs fyri, at nevndin verður afturvald.

Fíggjarnevndin heldur, at tann peningur, sum eftir er í Framtaksgrunninum, eigur at verða nýttur samsvarandi meginregluni, sum er, at Framtaksgrunnurin ikki skal hava avgerandi ávirkan á tey feløg, sum grunnurin velur at stuðla.

Tí skjytur fíggjarnevndin upp, at tann treyt verður sett við umleggingini, at undantakið verður tikið burtur, so at grunnurin ikki frameftir kann eiga meirlutan í nøkrum virkið, sum peningur verður settur í.

Ernst Hansen, fíggjarnevndarlimur, sigur fyri Dimmalætting, at einki kortini verður broytt í teimum feløgum, sum grunnurin longu eigur meirlutan í.

Hetta merkir, at Fiskasølan og Fiskavirking ikki verða skild frá grunninum, sum annars varð ført fram sum krav frá fleiri síðum undir fyrstu viðgerð av málinum.

Málið um Framtaksgrunnin hevur skund og verður tí viðgjørt í tinginum hósdagin.



Teir valdu oljuvinnuna

Teir báðir Ragnar Simonsen og Mikael Gren eru júst heimkomnir eftir at hava verið á trygdarskeiði hjá Transocean.

Um stutta tíð gongur leiðin í Eyturstjógvin, har teir skulu taka triðja og endaliga partin av skeiðnum. Báðir ætla sær at starvast í oljuvinnuni, tá teir hava tikið skeiðini, sum eru krav, skal ein arbeiða hjá oljufelagnum Transocean.

Síða 4

Snotiligar føroyskar kryddgentur

KATRIN PETERSEN

Fotohandilin í SMS framkallaði nakrar myndir av teimum, har tær til stuttleika høvdu latið seg í og dansað sum Spice Girls. Og so vóru tær fimm føroysku Spice Girls uppdagaðar... Lena Maria (Geri), Maria (Emma), Marjun (Mel C.), Erla Maria (Mel B.) og Rebekka (Victoria) eru allar tólv ára gamlar og fóru í gjár á pallin í SMS. Ílatnar, smurdar, syngjandi og dansandi sum Spice Girls – hetjurnar hjá øllum teimum, sum eru fødd eftir at MTV kom til Føroya. Okey, tær sungu kanska ikki rættiligt – tað gjørdu tær røttu krydd-genturnar á eini fløgu, sum spældi afturvið. Men hesar føroysku hava vant dúgliga, so dansurin skuldi líkjast tí, tær hava sæð á video. Og stóra mannamúgvan rundan um pallin klappaði óført, tá tær høvdu dansað til »Wannabe« og »Who Do You Think You Are.«

Báðir bilførararnir í kappkoyringini verða skuldsettir

Ferðsluvanlukkan á Strandavegnum í Havn pálmasunnudag í ár var á skránni í Føroya Rætti í gjár. Ákæruvaldið hevði biðið tveir persónar møta í rættinum, men av tí at annar persónurin var burturstaddur og dómarin hevði forfall, var málið útsett.

ELI GUTTESEN

Kappkoyringin millum tveir bilar pálmasunnudag í ár, endaði sum flestum kunnugt í eini syrgiligari vanlukku, tá annar av førarunum misti tamarhaldið á bilinum. Hjúnini Lis og Kriss Guttesen doyðu á staðnum, meðan sonurin kom álvarsliga til skaða.

Tveir persónar verða ákærdir í málinum. Hesir báðir vóru førarir av teimum báðum bilunum, sum koyrdu um kapp, tá vanlukkan hendi. Fleiri viðurskiftir eru í málinum og ákæra verður millum annað reist fyri brot á ferðulógina og revsilógina.

Óvilja manndráp

Ákæra verður millum annað reist eftir grein 241 í revsilógini, sum snýr seg um óvilja manndráp og grein 249, sum snýr seg um óvilja grova líkamsmeisling móti teimum persónum, sum vóru við í óhappinum.

Grundin til, at tveir persónar standa fyri skotum, er, at báðir hava luttikið í kappkoyringini gjøgnum býin, sum førdi til syndarligu vanlukkuna Yviri við Strond henda sunnudagin. Tí verður mett at tann persónurin, sum koyrdi tann aftara bilin eisini hevur ein part av ábyrdini av vanlukkuni.

Hvørja revsing persónarnir standa til at fáa er ikki gjørligt at siga nakað um í løtuni, men í Danmark hava teir hert revsingina á hesum øki. Harðasta revsingin, sum er givin niðri fyri óvilja manndráp er fýra ára treytaleys fongsulsrevsing.

Snildur føroyingur lokkar pengar frá fólki

Í summar vóru nógvar lýsingar at síggja í bløðunum, har ein fyritøka í Svendborg bjóðaði føroyingum bílig lán uttan trygd ella lánfør. Ein nærri kanning vísir nú, at tað er ein føroyingur, sum stendur aftanfyri hesum bluffnummari.

ELI GUTTESEN

Trupult hevur verið at finna fram til mannin tí fyri tað fyrsta er hann fluttar av landinum til Danmarkar. Síðan hevur hann aftur flutt bústað til Svøríki, har hann hevur fingið sær eitt svenskt navn. Men hóast bústað í Svøríki arbeiðir maðurin í Danmark.

Maðurin hevur brúkt ein snildan máta at vinna sær pening. Frá eini danskari fyritøku har hann hevur arbeitt sum leysamaður, hevur hann sent lýsingar í faxi til ymisk tíðarrit. Lýsingin hevur vent sær til fólk, sum hava stóran lánitørv. Øll sum settu seg í samband við »Independent Consultants«, sum fyritøkan kallaðist, kundu fáa lán fyri upp til 120.000 kr. uttan treytir frá einari ónavngivnari altjóða fyritøku. Einasta treyt var, at lántakarin frammanundan rindaði 350 kr. til lýsarin fyri 8 síður við upplýsingum og umsóknarblaði.

Sorterar við telefonsvarara

Fyri at koma í samband við lángevaran var neyðugt at lesa inn navn ella telefonnummar á ein bandspælara í Svendborg. Ein rødd á bandspælaranum greiddi síðan frá á enskum, at tey vildu ringja aftur.

Dimmalætting royndi at koma í samband við fyritøkuna, men hetta eydnaðist ikki. Tey bæði telefonnummarini, sum vóru tøk, góvu bert eitt telefaks og ein telefonsvarara. Bústaðurin hjá ti sum stóð fyri lýsingunum var í eini postboks og hetta kundi bent á ein snildan máta at lokka 350 kr. frá fólki, sum einki fáa afturfyri.

Fyritøkan, sum kallar seg »Independent Consultants«, hevur enn adressu í eini postboks í Svendborg. Felags fyri hesa fyritøkuna og eina aðra við navninum »Anderson Consultants«, er at sama telefonnummar hevur verið nýtt. Men nú er telefonnummari broytt til 022219989. Tá tú roynir hetta kemur ein rødd til, sum biður teg tosa boð inn á band. Einki verður nevnt um hvør fær boðini tú tosar inn.

Fyri at fáa fatur í manninum sum stendur fyri hesum átakinum, hava vit vent okkum til fyritøkuna sum eigur telefaksið, haðani maðurin hevur sent lýsingarnar sum eru farnar í bløðini. Haðani verður upplýst, at tey kenna væl henda mannin og at hann av og á arbeiðir fyri hesa fyritøkuna. Hann er dugnaligur og arbeiðir sum leysamaður og lønin verður útgoldin kontant móti rokning. Tey siga seg ikki vita av, at maðurin hevur nýtt telefaksið hjá fyritøkuni í privata fyritaksseni sínum, tá hann hevur sent tilfar til Føroyar.

Á dansku fyritøkuni kenna tey mannin best undir føroyska navninum, men vátta samstundis, at maðurin eisini hevur brúkt eitt svenskt navn. Hetta passar væl við teir upplýsingar Dimmalætting hevur fingið um persónin, sum stendur aftanfyri øllum hesum. Tað er øll grund til at halda at maðurin ikki hevur reint mjøl í posanum og roynir at sletta øll spor eftir sær.

Partabrøv ávirka framvegis

Gongdin á partabrævamarknaðunum hevur eisini seinastu vikuna ávirkað rentur og gjaldoyru. Hóast skelkurin í USA og Europa tykist at vera horvin, er enn ov tíðliga at siga, at kreppan er av. Japanski yennurin og amerikanski dollarin eru viknaðir. Eisini norska krónan er viknað orsakað av partabrævagongdini.

Partabrævamarknaðirnir hava ta seinastu vikuna áhaldandi víst vegin fyri lánsbrævamarknaðinum og partvíst eisini gjaldoyramarknaðinum. Tá kursirnir á partabrøvunum eru hækkaðir, eru kursirnir á lánsbrøvunum lækkaðir og øvugt. Flytingarnar hava tó ikki verið eins ógvisligar og mánadagin og týsdagin í síðstu viku.

10-ára danska statslánsbrævið kostaði kl. 12 í gár 106,18 móti 106,47 fyri viku síðan. 2-ára statslánsbrævið kostaði 102,36 móti 102,43 fyri viku síðan. Sum heild hava flytingarnar seinastu vikuna ikki verið stórar.

Kreppan ikki av

Hóast skelkurin í stóran mun er horvin á amerikanska marknaðinum, tykist enn ov tíðliga at siga, at kreppan er av. Orsøkin er, at stór óvissa framvegis valdar í Asia, har kreppan byrjaði, tá Thailand gjørdi av ikki longur at verja bytið millum thailendska gjaldoyrað og dollaran. At kreppan nú eisini er komin til Suður- og Miðamerika ger ikki støðuna betri. Av hesi orsøk er væntandi, at partabrævamarknaðirnir eisini næstu tíðina fara at ávirka rentur og gjaldoyru.

Yennur og dollari viknaðu

Dollarin, sum partvíst var styrknaður aftur eftir stóra partabrævafallið í síðstu viku, viknaði aftur í gár móti týska markinum - DEM - og harvið eisini dansku krónuni. Høvuðsorsøkin til styrknaða DEM er at finna í Japan, har spurnartekin av nyggjum varð sett við styrkina í japansku figgjarskipanini. Hetta hevur havt við sær, at dollarin fall úr 661,75 mánadagin til 656,70 í gár. Fyri viku síðan kostaði dollarin 658,35.

Norska krónan viknað

Hendingarnar á altjóða partabrævamarknaðunum hava eisini ávirkað norsku krónuna, sum seinasta mánaðin er viknað nakað saman við dollaranum. Serliga er tað fánaðu útlitini fyri eini rentuhækking, sum hava fört til eina viknaða norska krónu. Fyri einum mánaði síðan var virðið á eini norskari krónu 0,9542 krónur. Virðið er nú fallið til 0,9350.

FØROYA BANKI















Peningamarknaðarrentur, DKK (CIBOR)	4. nov. 97	28. okt. 97	4. nov. 96
Diskonto*	3,50%	3,50%	3,25%
1 mánaði	3,84%	3,83%	3,60%
3 mánaðir	4,00%	3,99%	3,69%
6 mánaðir	4,19%	4,19%	3,80%

*) Seinast broytt hin 16. oktober 1997

Gjaldoyra	4. nov. 97	28. okt. 97	4. nov. 96
US dollari	656,70	658,35	581,50
Enskt pund	1104,18	1103,07	951,88
Týskur markur	380,56	380,73	384,34
Norsk króna	93,50	93,33	91,25
Franskur frankur	113,63	113,61	113,69
Japanskur yen	5,404	5,4826	5,1406

Lánsbrøv	3. nov. 97		27. okt. 97		4. nov. 96	
	Kursur	Eff. renta	Kursur	Eff. renta	Kursur	Eff. renta
7% Føroya Landsstýri 1997*	100,24	4,60%	100,28	4,58%	102,10	5,54%
6% St. lán 1999	102,35	4,79%	102,15	4,90%	102,84	4,97%
6% St. lán 2002	102,49	5,42%	102,28	5,47%	100,04	5,99%
7% St. lán 2007	106,11	6,16%	106,47	6,12%	99,42	7,08%

*) Vegna tilan handil í lánsbrævunum eru kursurin og effektiva rentan 3. nov. 1997 útroknað út frá tilsvarandi donskum lánsbrevum. Av somu orsøk eru talini fyri undanfarnu dagarnar ikki altíð eitt haldgott mát fyri veruliga marknaðarkursin tann ávisa dagin.

Johnny Magnussen, sum er sølustjóri í Telekompagniet, bjóðar føroyingum niðri í Danmark at ringja bíligari heim til Føroya

Altjóða telefonrisi bjóðar bíligar samrøður

Føroyingar í Danmark kunnu fáa samrøður heim til Føroya, sum kosta væl minni enn tær vanligu samrøðurnar gjøgnum TeleDanmark. Men eisini føroyingar í Føroyum kunnu fáa fyrimunir av slíkum tilboðum.

INGI RASMUSSEN

Amerikanski telefonrisin Telegroup, sum í Danmark ber navnið Telekompagniet, hevur sent ein prislista á marknaðin yvir telefontakstir úr Danmark til útlandið.

Sambært prislistanum, so kunnu føroyingar í Danmark, sum tosa ofta heim, spara nógvan pening við at ringja gjøgnum hetta felagið.

Samanborið við TeleDanmark kanst tú spara 16 prosent við at ringja til Telegroup fyrst.

Av sølulistanum, sum samanber kostnaðin fyri at ringja hjá ymsum telefonfeløgum, sæst, at tað kann gerast enn bíligari. Gjøgnum vanliga sambandi hjá TeleDanmark kostar tað 3,50 krónur fyri minuttin at ringja til Føroya úr Danmark. Telegroup bjóðar somu samrøður fyri 2,93 krónur, Telia kostar 3,00 krónur og Tele 2 A/S kostar einans 2,90 krónur fyri minuttin.

Johnny Magnussen, sum er sølustjóri í Telekompagniet, sigur, at føroyingar í Føroyum eisini kunnu fáa gleði av skipanini, men tá eru prisirnir ikki heilt teir somu, sum teir eru hjá kundunum í Danmark.

– Prisirnir verða gjørdir eftir kundagrundarlagnum, og tí er tað helst nakað dýrari at brúka tænastuna í Føroyum, sigur hann, men hann roknar kortini við, at tað kann gerast nakað bíligari enn gjøgnum okkara egna telefonverk.

Telekompagniet hevur lagt út við nøkrum tilboðum, sum kunnu líknast við dumpingprisir, kanska serliga fyri at draga vinnulivskundar til sín. Eitt nú er prisurin fyri at ringja til Onglands helvtin av tí, tað annars kostar. Tú sparir 40 prosent við at ringja til Týsklands og 42 prosent, tá tú ringir til Fraklands. Hetta er væl at merkja alt sammett við prisirnir hjá TeleDanmark.

Púra lógligt

Fyri tey, sum búgva niðri, gongur tað fyri seg á tann hátt, at ringt verður fyrst til ein telefonfelaga í Valby, og haðani verður ringt viðari.

Um tú skalt gera nýtslu av tænastuni úr Føroyum, skalt tú brúka eina skipan, sum kallast «call-back». Tú mást fyrst ringja til eitt telefonnummar í USA, og síðani leggur tú hornið á. Innan seks sekund ringir telefonin aftur, og tú fært ein klártóna. So kanst tú ringja til hvønn sum helst, hvar sum helst.

Johnny Magnussen sigur, at einki ólógligt er í hesum.

– Tað svarar til, at tú hevur eina mostur í USA, sum tú ringir til, og sum ringir teg uppaftur, tí tað er bíligari, greiðir Johnny Magnussen frá.

Hann sigur, at tað er væl hugsandi, at skipanin, sum tey hava niðri við fastari linju, kemur at virka fyri Føroyingar, men tað veldst eisini um, hvussu stórur kundabólkurin er.

Takstirnir hjá Telekompagniet eru atgeingiligir bæði hjá privatum og vinnufyritøkum, sum bara skulu trýsta nøkur tøl, áðrenn tey ringja upp.

Tað er ókeypis at gerast kundi.

Ragnar og Mikael hava valt oljuvinnuna



Ragnar Simonsen og Mikael Gren eru fyri kortum heimkomnir úr New Orleans, har teir hava luttikið á trygdarskeiði hjá Transocean. Um stutta tíð gongur leiðin í Norðsjógvin, har teir í fjúrtan dagar skulu taka triðja og endaliga partin.

DIA MIDJORD

34 ára gamli sviin Mikael Gren, sum er útbúgvin bílmekanikari og maskinmeistari, og 21 ára gamli Ragnar Simonsen, sum fekk studentaskúlaprógv í fjør, fingu sera góð úrslit eftir 1. og 2. part av trygdarskeiðnum. Teir fingu 90 stig av 100 møguligum, og tað er ikki hvønndagskostur á trygdarvenjingardeplinum í New Orleans.

Teir eru fyri kortum heimkomnir og hava lokið tveir triðingar av trygdarskeiðnum, sum borifelagið Transocean skipar fyri. Øll starvsfólk hjá felagnum skulu igjøgnum hetta skeið.

Skeiðið er býtt sundur í triggar partar - A, B og C. Í New Orleans verða A og C- skeiðið tikið og síðan verður B-skeiðið tikið úti á einum boripalli. Her skulu næmingarnir vísa, at teir kunnu fremja teoretiska partin í verki. Mikael Gren og Ragnar Simonsen skulu avstað til Aberdeen í næstum, haðani teir skulu út á ein av teimum 11 boripallunum hjá Transocean í Norðsjónum. Teir vita ikki hvagar teir skulu, men eftir øllum at døma skulu teir út á Transocean Leader, ið er ein av heimsins størstu boripallum.

Ragnar Simonsen (vinstrumegin) og Mikael Gren ætla sær eina framtíð innan oljuvinnuna

Hava valt oljuvinnuna

Ragnar Simonsen ætlar sær at arbeiða í oljuvinnuni. Hann lúrir eftir einum møguleika á oljupalli í Norðsjónum, og seinni ætlar hann sær at venda nøsina móti Amerika. Frálæra í vinnuni fæst umborð á ymsu pallunum.

Mikael Gren er útbúgvin maskinmeistari og ætlar sær eisini eina framtíð í oljuvinnuni. Hann hugsar mest um okkurt arbeiði, ið hevur við tekniska partin umborð á pallunum at gera. Tað er umboðsmaðurin hjá Amerada Hess í Føroyum, Johan Mortensen, ið hevur fingið avtaluna í lag hjá hesum báðum føroyingunum.